# Nýggir filmar hesa vikuna

**Støð**
Filmsheiti, **Dagur/ar** ***(klokkutíð)***

**Svf**
- Diamantveiðimenninir – suðurafr./am. filmur - Óhóskandi fyri smábørn, **05.** ***(22.20)***
- The Haunting – am. ræðufilmur - Óhóskandi fyri børn, **05.** ***(00.00)***
- Skeivir dagar – bretskur filmur, **06.** ***(20.35)***
- G.I. Jane – amerikanskur spenningsfilmur - Óhóskandi fyri børn, **06.** ***(23.25)***
- Ein fyrimyndarligur maður – bretskur filmur, **07.** ***(21.25)***

**BBC Prime**
- Kommisser Boyd: Eitt burturlagt mál, **08.** ***(20:00)***
- Night Flight, **05.** ***(20:00)***

**Canal+**
- Á ævintýri við Pinocchio, **09.** ***(19:00)*** **11.** ***(14:30)***
- Big Fat Liar, **06.** ***(19:00)*** **07.** ***(10:50)***
- Hedwig and the Angry Inch, **05.** ***(19:00)***
- Kugler og kærlighed, **10.** ***(19:00)*** **11.** ***(8:45)***
- Say Nothing, **11.** ***(19:00)***
- Úlvagentan Tinka, **07.** ***(9:05)***

**Canal+Gul**
- Dragonfly, **05.** ***(23:00)***
- Hysterical Blindness, **05.** ***(21:25)***

**DR 1**
- Born Romantic, **05.** ***(22:30)***
- Drongurin og tann villi losurin, **06.** ***(8:20)***
- Fletch vendir aftur, **06.** ***(19:45)***
- Gøtudreingir, **06.** ***(22:55)***
- Hans onsdagsveninde, **07.** ***(12:35)***
- In & Out, **05.** ***(21:00)***

**DR 2**
- Bella Martha, **06.** ***(18:16)***
- Ditte Menneskebarn, **08.** ***(19:00)***
- H.C. Andersen og skeivi skuggin, **11.** ***(22:00)***
- Quiz Show, **07.** ***(19:05)***

**Hallmark**
- Hard Ground, **06.** ***(20:45)***
- Haunting Of Seacliff Inn, The, **10.** ***(10:15)***
- Journey To The Center Of The Earth, **08.** ***(10:15)*** **09.** ***(10:15)***
- Santa Junior, **06.** ***(8:30)***
- The Haunting Of Seacliff Inn, **10.** ***(17:00)***

**TCM**
- Full Metal Jacket, **07.** ***(21:00)***

**TV 2 zulu**
- Chippendales - nakni sannleikin, **06.** ***(19:00)***
- Myrkrið hevur eygu, **05.** ***(19:00)***

**TV 3**
- Myrkaspæl, **08.** ***(21:20)***
- Mystery Science Theater 3000, **06.** ***(22:05)***

**TV-1000**
- Love and a Bullet, **11.** ***(19:00)***
- Pelle Politibil, **06.** ***(15:00)***
- Rollerball, **06.** ***(19:00)***
- Trois 2 - Pandoras box, **05.** ***(19:00)***
- Van the Man, **07.** ***(19:00)***

**TVDanmark1**
- Á heimafrontinum, **11.** ***(23:40)***
- Bert Rigby, tín dummi hundur!, **10.** ***(0:20)***
- Eitt fullkomið morð, **09.** ***(20:00)***
- Fars fede ferie, **05.** ***(20:00)***
- Goymda andlitið, **11.** ***(20:00)***
- Small Soldiers, **08.** ***(20:00)***
- Vandamikli vegurin til Kina, **08.** ***(0:30)***

**TVDanmark2**
- Amistad, **06.** ***(19:50)***



**Fríggjadag 5. kl. 18.10**



### Bláa gongustjørnan
Pólarhøvini eru ein heimur í sær sjálvum. Yvir ísinum ýlir illveðrið, men undir ísinum í sjónum er ein friðsæl og næstan gandað tøgn. Um veturin gevir veika sólarljósið ongan hita og hitastigini liggja um 50 minus-stig.

**Fríggjadag 5. kl. 19.00**



### Stjørna eitt kvøld - finalan
So verður avdúkað, hvør skal gerast stjørnan yvir øllum stjørnum. Sendingin Stjørna eitt kvøld verður send beinleiðis úr Forum í Keypmannahavn. Á pallinum síggja vit sjálvandi tey sum kappast, umframt fleiri kendar tónleikabólkar uttan úr heimi. Natasja Crone er vertur.

**Fríggjadag 5. kl. 20.00**



### Behind The Music: Foreignar
Við nærum 50 milliónum seldum í USA eru Foreigner ein av teimum mest suksessfullu rokkbólkunum í tónleikasøguni. Í 1976 varð bólkurin stovnaður og maðurin aftanfyri tónleikin er gittarisiturin Mick Jones.

**Fríggjadag 5. kl. 21.15**



### Jól á Vesturbrúgv (5:24)
Arne skal meta um húsligu eginleikarnar hjá Danny. Men er nakað galið við heimbýlinum hjá kapteyninum? Jól á Vesturbrúgv er jólakalendarin í 24 pørtum til tey vaksnu.

**Leygardag 6. kl. 15.00**



### Tipsleygardagur Beinleiðis: FC Nordsjælland - AGF
Tipslørdag á 3+ vísir donsku SAS Liga dystirnar. Áðrenn dystin eru nógv spennandi fótbóltsinnsløg, eins og í sjónvarpsstovuni hjá Dan Sørensen altíð er ein ella fleiri viðkomandi gestir út danska fótbóltsheiminum. Her finnast eisini møgulig tips og hentleikar til tipskupongina og oddset, og eisini er ein stór SMS-kapping.

**Leygardag 6. kl. 18.15**



### Temaleygardagur: Stjørnukokkar
Stjørnukokkar - tað er heimskendir kokkar - ganda við bestu rávørum og í køkunum á teimum fínastu matstovunum. Tað sær leikandi lætt út, men at vera stjørnukokkur er ikki einans eitt arbeiði - tað er ein lívsháttur. Í kvøld snýr tað seg um kokkastarvið.

**Leygardag 6. kl. 20.00**



### 4. SATSA
Komandi fýra leygardagarnar senda vit eina serliga útgávu av SATSA. Luttakararnir eru yngdir nakað, tí tað verða børn úr 5. og 6. flokki, sum skulu dystast. Mannagongdin í sendingunum er eisini broytt soleiðis, at tey ikki dystast um pengar, men um stig.

**Sunnudag 7. kl. 21.40**



### Gintberg - Var det det? (7:8)
Talkshow hjá skemtaranum Jan Gintberg og hansara trúgvu starvsfelagum. Ein rúgva av skemtisøgum, sketjum og gestum skulu fáa hyggjaran at ásanna, at ein hálvur tími kann ganga ótrúliga skjótt.

**Sunnudag 7. kl. 17.30**



### Michael Palin í fótsporum Hemingways
Michael Palin, kendur úr skemtirøð-ini Monty Python, fylgir í fótaspor-unum hjá síni hetju, høvundanum Ernest Hemingway. Depressivur, alkoholiskur og ofta uppafturgiftur. Á teimum ymisku støðunum, ið Palin vitjar verður Hemingway lýstur. Michael vitjar m.a. Chicago, og smáttuna í Michigan, har Hemingway vanliga fiskaði.

**Sunnudag 7. kl. 20.00**



### Tei-tour - á konsertferð við Teiti Lassen
Síðani Teitur Lassen skrivaði undir sáttmála við risaplátufelagið Universal Records og fløgan Poetry and Aeroplanes kom út, hevur Teitur ferðast runt í USA á konsertferð. Sjónvarpið hevur verið og vitjað Teit og í sendingini fáa vit eina mynd av, hvussu lívið er, tá dreymirnir gerast veruleiki.

**Sunnudag 7. kl. 20.00**




### Almost Famous
Tanára blaðmaðurin William Miller gerst ovurfegin, tá hann fær starv hjá tí væl kenda tónleikatíðarritinum Rolling Stone. Hóast at mamma hansara als ikki dámar hetta, fer William á konserttúr við einum rokkbólki. Hann gerst skjótt greiðir yvir at tað, hann skrivar um, snýr seg um meiri enn bara tónleik.

**Sunnudag 7. kl. 23.20**




### Chicago Cab
Søgan fylgir einum hýruvognsførara, ið er til arbeiðis jólaaftan í Chicago Southside. Hann møtir ymiskum persónum, ið eru m.a. víðgongdir átrunaðligir, ein sera krígssinnaður indiánari, ein narkomanur, sum leitar eftir partnarastoffi og sum allatíðina skeldast.

**Mánadag 8. kl. 18.00**



### Simpsons
Troy McClure presenterar tríggjar annarleiðis Simponssøgur.
Løgregluovastin Wiggum gevst við arbeiði sínum. Hann blívur detektivur og flytir til New Orleans. Sálin hjá Grandpa Simpson verður fanga í eini autmat hjá Moe. Triðja søgan kallast The Simpsons Family Smily-Time Variety Hour.

**Mánadag 8. kl. 19.00**



### Fílarnir í Burma
Í skógunum í Burma livir ein bólkur av elefantum úti í tí fría, soleiðis teir hava gjørt tað síðan tíðarinnar morgun. Í eini náttúru uttan mørk yvirliva teir hvønn dagin burturi frá manni. Men tó ikki. Villu elefantarnir eru hóttir av fátøkum bóndum, ið krevja meiri jørð.

**Mánadag 8. kl. 20.25**




### Veðrið
Sjónvarp Føroya fer undir at gera uppaftur meira burturúr veðurtíðindun-um. Veðrið verður tískil ein sjálv-støðug sending og ikki endabrestur-in á tíðindasendingini. SvF fer at greiða frá veðurlagnum í landinum og frá havinum kring Føroyar og metingin er frá DMI á middegi sama dag. SvF lova ikki betri veður, bara betri veðurtíðindi!

**Mánadag 8. kl. 22.05**



### Kicker
Fótbóltur úr Premier League og Bundesliga. Fótbóltssendingin, Kicker, gevir hyggjarunum hvønn mánadag mál og hæddarpunkt úr vikuskiftisdystunum í bestu ensku deildini og týsku Bundsliga. Tað er her Thierry Henry, Ruud Van Nistelrooy, Michael Ballack & Co. gera um seg.

**Týsdag 9. kl. 19.00**



### Champions League Beinleiðis: Manchester United - Stuttgart
Meistaraliðini úr Týsklandi og Onglandi møtast á Old Trafford í eini rættari finalu í innleiðandi Bólki E. Her verður avgjørt hvør verður sitaður hægri í lutakastinum um áttindadeilsfinalunum. Stuttgart vann seinast liðini møtust, 2-1.

**Týsdag 9. kl. 20.00**



### Oliver´s Twist
Góða vinkona Jamie, Paula, skal giftast. Tað eru ein rúgva av ymiksum viðurskiftum, sum skulu fáast í rættlag, áðrenn stóra dagin. Meistarakokkurin Jamie Oliver gandar á ymiskan hátt við mati.

**Týsdag 9. kl. 20.50**



### Heavan´s Burning
Ein japonsk brúður (Youki Kudoh) er rýmd frá manni sínum. Nú er hon einsamøll í Sydney og elskari hennara, sum skal bjarga henni frá manni sínum, ikki er at síggja. Tað byrjar við at Midori ger sum um hon er burturflutt á brúðarnátt síni, fyri at sleppa undan manni sínum Yukio. Hon møtir so bankaránaranum Colin (Russell Crowe).

**Týsdag 9. kl. 22.20**



### Merry Christmas, Mr. Lawrence
Undir seinna heimsbardaga verður bretski heryvirmaðurin Jack Celliers førdur til eina japanska krígs-fangalegu av stjóranum fyri leguni, tí stórbæra Yonoi. Yonoi, sum livir sítt lív eftir samuraisiðvenju, ger alt fyri at knúska hendan løgna bretan. Tað verður ein dystur um vilja, men samstundis veksur eitt samband millum fangan og vaktarmannin.

**Mikudag 10. kl. 19.00**



### Champions League Beinleiðis: Arsenal - Lokomotiv Moskva
Verturin í TV3 sjónvarpshølinum er Jakob Kjeldberg, sum saman við ekspertunum Preben Elkjær og Brian Laudrup hyggja nærri eftir kvøldsins dysti. Tátturin, Goal-Show er við í sendingini - hvørjaferð eitt mál verður skorað í kvøldsins CL-dystum, verður tað víst.

**Mikudag 10. kl. 20.00**



### Sheryl Crow & Friends
Konsert við Sheryl Crow og vinum, m.ø.: Stevie Nicks, The Dixie Chicks, Eric Clapton, Keith Richards og fleiri. Sangir sum "White Room", "Gold Dust Woman", "There Goes The Neighborhood", "If it makes you Happy" og fleiri.

**Mikudag 10. kl. 21.00**



### Berlusconi og vald hansara
Silvio Berlusconi er valdmiklasti maðurin í Italia. Hetta seinasta hálva árið hevur hann staðið á odda fyri Evopa. Sendingin fylgir teimum, ið royna at stríðast móti Berlusconi og hansara valdsskipan. Sendingin vísir eisini tað, sum hendir, tá ein setir seg ímóti valdmiklasta manninum í Italia.

**Mikudag 10. kl. 21.20**



### A season for Miracles
Unga Emilie er noydd at taka sær av systirdøtrini og systirsoninum, tí systir hennara verður innløgd á sjúkrahúsið orsaka av at hon hevur tikið eina yvirdosis. Møguliga verða børnini tikin frá familjuni av myndugleikunum. Tey rýma, men so hendir okkurt heilt, heilt óvanligt...

**Hósdag 11. kl. 18.00**



### Jól á posthúsinum
Boði hevur tíbetur ikki heilt mist mótið. Hann gongur og telur upp. Og hóast alt sær út, sum tað plagar, so er einki sum tað var. Halla og Rógvi vísa seg at vera tveir trúgvir vinir, sum fegin vilja hjálpa. Men at fara inn í hillarúmið uttan loyvi, tað er ikki gott. Boði gloymir og er so syrgin, tá er so møguleiki hjá teimum sum vilja hjálpa, at ringja inn.

**Hósdag 11. kl. 19.00**



### Heksurnar úr Warren Manor (103)
Phoebe og Paige finna útav at gandur, bæði svartur og hvítur, er horvin. Tískil kann óndskapannar ríki taka ófødda barnið hjá Piper. Nú mugu Phoebe og Paige gera alt tær megna fyri at bjarga tí ófødda barninum, uttan gand...

**Hósdag 11. kl. 19.00**



### Say Nothing
Grace møtir einum nýggj-um manni á eini stuttferð. Hon endurupplivir litin-skapin, og tá hon kemur heimaftur, er hennara tilvera bjartari. Maður Grace fær nýtt starv og alt gongur væl, inntil hon møtir nýggja stjóra sínum.

**Hósdag 11. kl. 20.00**



### Michael Palin í fótsporum Hemingways
Michael Palin, kendur úr skemtirøð-ini Monty Python, fylgir í fótasporun-um hjá síni hetju, høvundanum Ernest Hemingway. Depressivur, alkoholiskur og ofta uppafturgiftur. Á teimum ymisku støðunum, ið Palin vitjar verður Hemingway lýstur. Michael vitjar Key West, sunnasta býin í USA, síðan til Uganda og Murchison Falls og endaliga til Venice.

**Sunnudagin kl. 14.15**

### Framvið ánni´
Vitjað verður í Hovi og farið verður ein túr niðan á Vatnsnes, har Ditlev Hammer sigur frá søgum og sagnum í Hovi. Prátað verður eisini um umhvørvið framvið Hovsá.

Jónheðin Tróndheim leggur til rættis.

**Hósdagin 11. kl 07.35**

### Góðan morgun í Suðuroynni
Hósdagin 11. og fríggjadagin 12. desembur, verður morgunsendingin hjá Útvarpi Føroya send av Hotel Tvøroyri.

Hetta er fyrstu ferð, at Góðan Morgun Føroyar verður send í tveir fylgjandi dagar, tá vitjað hevur verið á bygd. Og tað hevur eisini við sær, at øll oyggin verður arbeiðsøki.

Ætlanin er at fáa áhugaverdar gestir á gátt á Hotel Tvøroyri, eins og leysu útvarpsmenninir vitja áhugaverd fólk í bygdunum. Bæði Sumbingar og Sandvíkingar kunnu vænta sær, at snýið í einum útvarpsmanni stingur seg inn um hurðina.

Kannað verður, hvussu fólkalívið og vinnulívið hava tað í Suðuroynni. Fólk fara at siga frá forkunnugum søgum. Onkur spælir uppá. Jólastákanin verður umrødd. Prátað verður um onkrar mentanarligir varðar, og nógv annað.

Allar avtalur eru ongantíð gjørdar, tá útvarpsstovan verður flutt langa leið. Altíð er pláss fyri tí óvæntaða. Og kenna vit suðringar rætt, so eru teir meistarar í tí spontana.

Útvarpshópurin verður størri hesaferð, samanborið tá vitjað varð í Íslandi í oktobur mánað. Fýra programmfólk og tveir teknikarar fara um fjørðin.

Vertur á Hotel Tvøroyri verður Jákup Magnussen. Og leysu útvarpsmenninir verða Bjarni Mohr, Elis Poulsen og Øssur Egholm.


## VARPIÐ

Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 341800
Fax: 341801
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin


## Ítróttur

**TV3+**

**Leygardagin kl. 15.00**
Tipslørdag: FC Nordsj.-AGF
**Sunnudagin kl. 16.00**
SAS-ligan: Aab-Brøndby
**Mikudagin kl. 19.00**
Champions League: Arsenal-Lokomotiv Moskva

**CANAL+**

**Leygardagin kl. 12.25**
Premier League: Newcastle-Liverpool
**Leygardagin kl. 14.45**
Premier League Leygardagur
**Leygardagin kl. 0.00**
NHL: Toronto-Detroit
**Sunnudagin kl. 16.00**
Premier League: Southampton-Charlton
**Sunnudagin kl. 22.00**
NHL: N.Y. Rangers-Tampa Bay
**Mikudagin kl. 0.30**
NHL: New Jersey-N.Y. Islanders
**Hósdagin kl. 3.00**
NHL: Vancouver-Colorado

**CANAL+**

**Leygardagin kl. 19.25**
Seria A
**Sunnudagin kl. 19.25**
Seria A

**Sunnudagin kl. 14.30**
V5-Travet

**EUROSPORT**

WC Strok úr Lake Louise, USA
WC Super-G úr Lake Louise, USA
WC Strok úr Vail, USA
WC Snirr úr Vratna, Slovakia
WC Super-G úr Vail, USA
WC Skíðlop úr Trondheim, Noreg
WC Skíðskjóting úr Kontiolahti, Finnlandi
WC Skíðskjóting úr Hochfilzen, Eysturríki
WC Langrenn úr Toblach, Italia
WC Langrenn úr Trondheim, Noreg
EM Curling úr Courmayer, Italia
Badminton úr Saarbrücken, Týsklandi
Nevaleikur

**TV2 ZULU**

**Sunnudagin kl. 21.00**
NFL: New England Patriots-Miami Dolphins
HM Hondboltur úr Kroatia

**TV3**

**Týsdagin kl. 19.00**
Champions League: Manchester Utd-VfB Stuttgart

**TVDANMARK 1**

**Leygardagin kl. 13.55**
Bundesliga: Werder Bremen-Bayern München
**Leygardagin kl. 18.25**
La Primera: Deportivo la Coruna-Malaga
**Leygardagin kl. 20.25**
La Primera: Barcelona-Real Madrid
**Sunnudagin kl. 19.55**
La Primera: Valencia-Athletic Bilbao

Golf Omega Hong Kong Open
Fótbóltur Enska Liga Cup
Kurvabóltur Euroleague